# Kommunustýrisskipan

# fyri

# Eysturkommunu

## 1.partur

## Býráðið

§ 1

Býráðið hevur 9 limir, ið verða valdir eftir teim til eina og hvørja tíð galdandi reglunum í kommunalu vallógini.

§ 2

Stk. 1. Samsvarandi reglunum í kommunustýrislógini velur býráðið við meirilutavali borgarstjóra fyri alt valskeið býráðsins. Borgarstjórastarvið er fulltíðarstarv. Eisini velur býráðið við meirilutavali varaborgarstjóra fyri alt valskeiðið.

Stk. 2. Um borgarstjórin av eini ella aðrari orsøk hevur forfall, røkir varaborgarstjórin borgarstjórastarvið. Varir fráveran meiri enn 2 mánaðir, skal býráðið velja fyribils borgarstjóra við gildi, til fráveran heldur uppat.

§ 3

Býráðið samtykkir eina fundarskipan, ið m.a. ásetir nærri reglur um fyrireiking, fundarboð, hvussu fundir skulu haldast og málsmannagongd o.a.

§ 4

Stk. 1. Býráðið tekur avgerð um, nær og hvar vanligir býráðsfundir skulu vera. Við byrjanini av hvørjum álmannakkaári verður hetta kunngjørt á tann hátt, ið vanliga verður nýttur í kommununi. Býráðið hevur almennan fund vanliga eina ferð um mánaðin.

Stk. 2. Eykafundir verða hildnir, tá ið borgarstjórin heldur tað vera neyðugt, ella um 1/3 av limunum krevur tað. Borgarstjórin ger av, nær og hvar eykafundirnir skulu vera, og um høvi er til tess, verða hesir almannakunngjørdir.

Stk. 3. Limur, ið hevur tørv á at fáa upplýsingar og tekniskan stuðul frá kommunalu fyrisitingini í samband við málsviðgerðina, fær hesa við at venda sær til borgarstjóran.

## 2. partur

## Borgarstjórin

§ 5

Nærri reglur um virksemi borgarstjórans verða ásettar í kommunustýrisskipanini, sambært § 22 í kommunustýrislógini.

§ 6

Stk. 1. Borgarstjórin hevur dagligu leiðsluna av kommunalu fyrisitingini. Hetta er lýst í kapitul 4 í kommunustýrislógini, og eru uppgávur hansara m.a. hesar:

- hevur dagliga leiðslu av kommunalu fyrisitingini,
- býtir málini út til tær ymsu nevndirnar,
- tekur sær av málum, sum ikki fara í nevnd,
- gevur fundarboð,
- fyrireikar býráðsfundir,
- kunnar býráðslimir um, hvørji mál koma fyri á fundum,
- leggur mál og málsupplýsingar fram við einum hóskandi tíðarskeiði, so at býráðslimir kunnu gera sær sína egnu meting um málið,
- boðar frá, hvørji mál eru beind í nevnd síðan seinasta fund,
- ansar eftir, at mál, ið krevja býráðsviðgerð, fáa tilíka viðgerð, og at neyðug ummæli verða fingin,
- sær til, at málini verða avgreidd og um neyðugt gera fyriskipan um hetta,
- tekur avgerð í málum, ið ikki tola at bíða og har eingin orsøk er til iva,
- ansar eftir, at farið verður fram eftir samtyktum býráðsins,
- ansar eftir, at allar útreiðslur og inntøkur hava neyðuga játtan og
- saman við einum persóni, sum býráðið hevur heimilað til tess, undirskrivar skjøl, ið binda kommununa.

Stk. 2. Borgarstjórin hevur eftirlit við, at mál, ið krevur býráðins avgerð og hoyrir undir fyrisitingarøki hjá nevnd, verður lagt fyri býráðið saman við neyðugum nevndarummæli, áðrenn býráðið tekur avgerð.

Stk. 3. Borgarstjórin hevur eyguni eftir, at einki mál liggur á láni. Nevndirnar hava skyldu til at greiða honum frá málum, tær hava við at gera, og hvussu tað liggur fyri við at avgreiða tey. Um neyðugt, ger hann fyriskipan fyri, hvussu málini skulu verða avgreidd.

§ 7

Stk. 1. Borgarstjórin ansar eftir, at hvør peningaupphædd – tað veri seg inntøka ella útreiðsla við kommunukassan – er bókað í kommunuroknskapin, og at upphæddin hevur heimild í ársfíggjarætlanini ella aðrari galdandi samtykt. Er talan um eina peningaupphædd, ið heimild ikki er fyri, leggur hann málið fyri býráðið.

## 3. partur

## Val av nevndum og vanligar reglur fyri virki teirra o.a.

§ 8

Stk. 1. Til at taka sær av teirri beinleiðis fyrisitingini av viðurskiftum kommununar verða skipaðar ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir.

Stk. 2. Býráðið velur lim í tær nevndir, stjórnir og tílíkt, har býráðið ella kommunan sambært øðrum fyriskipanum skal verða umboðað.

Stk. 3. Val av limum og tiltakslimum í fastar nevndir o.a. fer fram á fyrsta býráðsfundi og beint aftan á valið av borgarstjóra og varaborgarstjóra. Valið fer fram eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3 í kommunustýrislógini. Verður avgjørt at velja av nýggjum, stendur øll nevndin fyri vali.

§ 9

Stk. 1. Býráðið kann seta serstakar ráðgevandi nevndir, ið skulu taka sær av ávísum málum ella fyrireikandi ella ráðgevandi arbeiði fyri býráðið, fíggjarnevndina ella hinar føstu nevndirnar, sí § 30,31 og 32 í kommunustýrislógini.

§ 10

Stk. 1. Hvør nevnd hevur sína gerðabók, har allar samtyktir nevndarinnar verða førdar. Við fundarlok verður gerðabókin lisin upp og undirskrivað av øllum teim luttakandi nevndarlimunum.

Stk. 2. Hevur nevndarlimur serstøðu, kann hann krevja, at serstøða hansara í stuttum verður viðmerkt í gerðabókini. Tá mál, har nevndarlimur hevur serstøðu sambært gerðabókini, verða send øðrum mynduleikum, kann nevndarlimurin krevja, at mynduleikin verður kunnaður um tað, ið stendur í gerðabókini. Nevndarlimurin kann viðleggja málinum grundgeving fyri serstøðu síni.

§ 11

Stk. 1. Hendir tað, at ein nevnd hugsar um at fremja ætlanir, ið nerta við arbeiðsøki hjá aðrari nevnd, verða samráðingar at fara fram við hesa ella ummæli fingið til vega frá hesi nevnd, áðrenn ætlanirnar verða settar í verk. Um neyðugt luttekur borgarstjórin í samráðingunum.

Stk. 2. Hvør nevnd sendir, í samráð við Byggi- og býarskipanarnevndina, tilráðing til býráðið umvegis fíggjarnevndina viðvíkjandi íleggingararbeiði, ið hoyrir undir hennara fyrisitingarøki.

§ 12

Nevndirnar ansa eftir, at ikki verður brúktur meiri peningur enn avsettur er sambært teim einstøku upphæddunum á ársfíggjarætlanini ella játtaður við serstakari viðtøku. Um tað er hildið ynskjandi ella neyðugt at játta meiri pening, senda nevndirnar – umvegis fíggjarnevndina – býráðnum tilráðing hesum viðvíkjandi.

§ 13

Nærri reglur um nevndararbeiði kunnu verða ásettar í fundarskipan, sum býráðið góðtekur.

## 4. partur

## Fíggjarnevndin

§ 14

Stk. 1. Í fíggjarnevndini situr borgarstjórin, ið er nevndarformaður og 2 aðrir býráðslimir.

Fíggjarnevndin fyrisitur tey málsøki, sum løgd eru til hana sambært kapitul 8 i kommunustýrislógini.

Stk. 2. Fíggjarnevndin fyrisitur mál viðvíkjandi kassa- og roknskaparverkinum, lønar- og starvsfólkaviðurskiftum, burturleigu av ognum í minni enn fimm ár, tó ikki kommunalar íbúðir, jfr. § 25, 5, og allari umsiting kommununar.

Stk. 3. Fíggjarnevndin sendir býráðnum tilráðing um keyp ella sølu av føstum ognum, veðseting og um burturleigu í meiri enn fimm ár av ognum kommununar.

Stk. 4. Øll mál, ið snúgva seg um fígging, skulu – áðrenn tey verða løgd fyri býráðið til samtyktar – hava verið til ummælis hjá fíggjarnevndini.

§ 15

Stk. 1. Fíggjarnevndin ansar eftir, at peningaognir kommununar – íroknaður tann peningur, ið ikki er neyðugur til gjaldingar av dagligu útreiðslunum – verða goymdar á tryggan hátt og eisini soleiðis, at tær geva sum mest av sær.

Stk. 2. Tær peningaognir, ið ikki eru neyðugar at hava til taks í reiðum peningi fyri at greiða dagligu útreiðslurnar, skulu verða settar inn í peningastovn, á postgiro ella settar í slík lánsbrøv, sum verða nýtt, tá ið tað snýr seg um ognir hjá ómyndingum.

Stk. 3. Virðisbrøv kommununar skulu – um tey ikki eru tryggja á annan fullgóðan hátt – fáa átekning um, at tey eru ogn kommununar, og at eingin hevur ræði á nøkrum virðisbrævi uttan við samtykki býráðsins. Um tað er møguligt, skal átekningin verða skrivað í bók hjá avvarðandi stovni.

Stk. 4. Somu skyldur, sum frammanfyri eru tilskilaðar, hevur fíggjarnevndin viðvíkjandi øðrum peningaognum, sum kommunan hevur um hendur.

§ 16

Stk. 1. Fyri 1. oktober sendir fíggjarnevndin býráðnum uppskot til ársfíggjarætlan fyri komandi fíggjarár.

Stk. 2. Uppskot til ársfíggjarætlan skal viðgerðast tvær ferðir í býráðnum við í minsta lagi 14 daga millumbili. Ársfíggjarætlanin skal verða endaliga samtykt í seinasta lagi 1. december og latin landsstýrismanninum innan 3 gerandisdagar aftaná.

Stk. 3. Við hvørjari upphædd á uppskotinum skal verða viðmerkt:

1) tann upphædd, ið verður skotin upp fyri komandi ár,
2) tann upphædd, ið er avsett fyri verandi roknskaparár og
3) tann upphædd, ið er inngoldin ella brúkt í undanfarna roknskaparári.

Um roknskapurin fyri undanfarna ár ikki er lagdur fram, kunnu fyribils tøl úr honum verða nýtt.

Stk. 3. Tær íleggingar- og fíggjarætlanir, ið nevndin hevur gjørt, verða lagdar fram saman við uppskotinum til ársfíggjarætlanina. Við uppskotinum skulu fylgja upplýsingar um tær fíggjarligu broytingar, sum kunnu væntast í komandi roknskaparári.

§ 17

Fíggjarnevndin hevur ábyrgdina av
- at gjørd verður ein bókhaldsførsluskipan, ið gjølla sýnir, hvussu kommunuognin verður umsitin,
- at liðugur roknskapur við møguligum viðmerkingum verður grannskoðaður,
- at gera og taka støðu til viðmerkingar frá grannskoðanini,
- at leggja grannskoðaðan roknskap fyri býráðið til góðkenningar og undirskrivingar,
- at leggja grannskoðarafrágreiðing fyri býráðið til kunningar,
- at grannskoðaður rokskapur verður latin landsstýrismanninum innan 1. juni eftir endað fíggjarár.
- Útlán av kommunalum bygningum og ognum annars
- Sendir býráðnum tilráðing um keyp ella sølu av føstum ognum.

§ 18

Fíggjarnevndin ansar eftir, at ikki verður, uttan samtykki býráðsins, farið upp um tær á fíggjarætlanini viðtiknu peningaupphæddir og aðrar játtanir, hvørki tilsamans ella tá talan er um einstakar upphæddir, og at ikki verður farið undir eitt arbeiði, fyrr enn neyðug játtan er tøk sbr. § 19,2.

§ 19

Stk. 1. Fíggjarnevndin hevur eftirlit við fyrisitingini av peningi og bókhaldi kommununar. Hon ansar eftir, at inntøkurnar hjá kommununi koma inn rættstundis, og at møgulig útistandandi skuld verður innkravd. Eisini ansar nevndin eftir, at eftirstøðulistar verða gjørdir og kannar hesar við hóskandi millumbili.

Stk. 2. Fíggjarnevndin ásetur tær reglur, sum kommunala umsitingin hevur at ganga eftir, tá ið tað snýr seg um at siga nevndini frá, um tað í nøkrum føri er farið – ella kann væntast at verða farið – upp um tær einstøku peningaupphæddirnar á ársfíggjarætlanini ella tær upphæddir, ið játtaðar eru sambært serstakari viðtøku.

Stk. 3. Fíggjarnevndin ansar eftir, at øll onnur skjøl verða goymd á tryggan hátt.

## 5. partur

## Hinar føstu nevndirnar

§ 20

Stk. 1. Hesar føstu nevndir skulu verða valdar:

1. Byggi- og býarskipanarnevnd
2. Vinnunevnd
3. Mentanarnevnd
4. Trivnaðarnevnd

Stk. 2. Limirnir í teim í stk. 1 umrøddu nevndum verða valdir millum býráðslimirnar.

§ 21

Eftir áheitan frá fíggjarnevndini og innan eina tíðarfreist, sum henda nevnd setir, skulu nevndirnar koma við teirra parti av uppskotinum til ársfíggjarætlanina og til gerð av íleggingar- og fíggjarætlanum.

§ 22

Hvør nevnd gevur tilmæli til býráðið í málum, innan hennara fyrisitingarøki, har lóg áleggur býráðnum at geva tilmæli ella taka støðu.

§ 23

Hvør nevnd ansar eftir, at ikki verður, uttan samtykki býráðsins, farið upp um tær á fíggjarætlanini viðtiknu peningaupphæddir og aðrar játtanir, hvørki tilsamans ella tá talan er um einstakar upphæddir, og at ikki verður farið undir eitt arbeiði, fyrr enn neyðug játtan er tøk, sbr. § 19,2.

§ 24

## Byggi- og býarskipanarnevnd

Stk. 1. Byggi- og býarskapanarnevndin hevur 3 limir.

Stk. 2. Mál og uppgávur hjá byggi- og býarskipanarnevndini:

- Vatnverkið
- Vegirnir
- Kloakkirnar
- Gøtuljós
- Onnur teknisk viðurskifti, ið ikki hoyra undir aðra nevnd.
- Ansar eftir, at tær viðtøkur og reglugerðir, sum galda fyri nevndu málsøki, verða fylgdar.
- Øll mál, ið sambært byggilóggávu og lóg um býarskipanir og byggisamtyktir eru løgd undir býráðið.
- Allar umsóknir um bygging og sundurluting og viðger hesar sambært galdandi lógum, reglugerðum og fyriskipanum og ansar eftir, at øll bygging er í samsvar við hesum.
- Tá gøtu- veg- og onnur íleggingararbeiði skulu verða sett í verk, sendir nevndin tilmæli til býráðið hesum viðvíkjandi, samb. § 11,2.
- Eftirlit við, at gingið verður eftir teimum servituttum og deklaratiónum, sum álagdar eru til frama fyri kommununa.
- Fríðkan av bygdini í samráð við trivnaðarnevndina

Stk. 3. Til at viðgera tey ymsu sløgini av málum kann nevndin tilmæla býráðnum at velja eykanevndir við minst 3 limum – valdum eftir lutfalli. Ein limur í teknisku nevnd skal helst vera limur í slíkum eykanevndum.

§ 25

## Vinnunevnd

Stk. 1. Vinnunevndin hevur hevur 3 limir.

Stk. 2. Mál og uppgávur hjá vinnunevndini:

- Havnir og smábátahavnir
- Vinnuøkir og vinnubygningar
- Ferðavinnu
- Fiski- og alivinnu
- Vinnunýskipan
- Handils- og tænastuvinnu
- Bussleið

§ 26

## Mentanarnevnd

Stk. 1. mentanarnevndin hevur 3 limir.

Stk. 2  Mál og uppgávur hjá mnntanarnevndin
- Skúlar og undirvísingarmál
- Kvøldskúlain
- Tónlistaskúlin
- Bókasøvn
- Stuðul til mentan og frítíðarvirksemi
- Søvn
- Ítróttur og mentan (tónleikur, list, sjónleikurv.m)
- Vinarbýarsamstarv

Stk. 3. Eftir tilmæli frá navnanevndini gevur mentanarnevndin tilmæli til býráðið í málum viðvíkjandi nøvnum á nýggjum býlingum, gøtum, vegum o.ø.

Stk. 4. Eftir gjøllari reglum frá býráðnum útinnir nevndin studningsjáttanir til skúlabørn og til feløg, herundir eisini fyri stovnandi tiltøkum til frama fyri slík o.t.

Stk. 5. Nevndin tekur - saman við fíggjarnevndini - avgerð í málum, ið snúgva seg um útlán og burturleigu av rúmum í kommunalum ognum til nýtslu hjá feløgum o.ø., ið ætlað eru til mentanarendamál o.a.

§ 27

## Trivnaðarnevndin

Stk. 1. Trivnaðarnevndin hevur 3 limir.

Stk. 2. Nevndin tekur avgerðir í málum, ið sambært lóggávuni hoyra undir Trivnaðarnevndina. Í tann mun fyriskipaninar í lóggávuni ikki eru til hindurs, hevur nevndin eisini tær heimildir, sum sambært sosialu lóggávuni eru lagdar til býráðið.

Stk. 3. Mál og uppgávur hjá Trivnaðarnevndini:
- Dagstovnaøkið
- Eldraøkið
- Dagtilhaldið
- Barnavernd
- Heilsuøkið
- Socialmál
- Spælipláss

Stk. 4. Trivnaðarnevndin ger saman við byggi- og býarskipanarnevndini ætlanir fyri fríðkan av kommununi.

## 6. Partur

## Aðrar nevndir

§ 26

### Garðssýnisnevnd

Garðsýnisnevndin hevur 5 limir og verður vald eftir tilmæli frá Byggi-og býarskipanarnevndini.

§ 27

### Ferðslunevnd

Stk. 1. Ferðslunevndin hevur 3 limir og verður vald av býráðnum.

Stk. 2. Í nevndini eru 2 umboð vald av býráðnum og 1 umboð fyri løgregluna.

§ 28

### Bókasavnsnevnd

Bókasavnsnevndin hevur 3 limir. Teir verða valdir av býráðnum.

§ 29

### Tilbúgvingarnevnd

Stk. 1. Tilbúgvningartnevndin hevur 5 limir.

Stk. 2. Í tilbúgvingarnevndini situr borgarstjórin, sum er formaður, og tveir kommunustýrislimir afturat, tilbúgvingarleiðarin og eitt umboð fyri Føroya Landfúta

§ 30

### Barnaverndarnevndin

Stk. 1. Barnaverndarnevndin hevur 5 limir. Teir verða valdir av býráðnum

Stk. 2. Nevndin fyrisitur mál, ið sambært lóggávuni, kunngerðum, reglum um barnavernd og fyriskipanum, eru løgd undir kommununa, og skipar fyri teimum arbeiðum, sum skulu verða gjørd í hesum sambandi.

Stk. 3. Formaðurin og meirilutin í nevndini skulu hava viðkomandi førleika ella útbúgving. Harumframt skulu limirnir lúka treytirnar til val til bý- ella bygdaráð, vera samvitskusamir og álítandi borgarar, ið hava reina revsiváttan og góðan kunnleika til børn.

§ 31

**Navnanevndin**

Stk. 1. Navnanevndin hevur 5 limir og verður vald eftir tilmæli frá Mentanarnevndini

Stk. 2. Nevndin ráðgevur mentanarnevndini og ger uppskot til vegannøvn v.m.

## 7. partur

## Samsýningar o.a.

§ 32

Stk. 1. Borgarstjórin fær samsýning ájavnt við 37. lønarflokk sambært avtalu millum Fíggjarmálastýrið og Tænastumannafelag landsins.

Stk. 2. Borgarstjórin fær eftirløn v.m. samb. kunngerð um samsýning v.m. sambært kommunustýrislógini.
Stk. 3. Samsýning, borðfæ og eftirløn verða goldin frammanundan við 1/12 um mánaðin.

Stk. 4. Borgarstjórin fær ikki fundar- og aðrar samsýningar.

Stk. 5. Varaborgarstjórin fær samb. § 10, 11 og 12 í kunngerð um samsýning v.m. samb. kommunustýrislógini 10% av samsýningini, ið verður givin borgarstjóranum goldna forút við 1/12 um mánaðin fyri at røkja uppgávurnar hjá borgarstjóranum, tá ið borgarstjórin er burturstaddur ella í feriu.

Stk. 6. Fundarsamsýning verður latin fyri býráðsfundir og nevndar fundir sambært § 3 í kunngerð um samsýning v.m. sambært kommunustýrislógini.

Stk. 16. Fundarsamsýning verður latin fyri luttøku á skeiðum, býráðið hevur góðkent, umframt annað fundarvirksemi, sum verður gjørt eftir umbøn frá býráðnum smb. § 2,1-2 í kunngerð um samsýning v.m. sambært kommunustýrislógini.

## 8. partur

## Broytingar í stýrisskipanini o.a.

§ 33

Henda kommunustýrisskipan og broytingar í henni skal verða viðgjørd á tveimum býráðsfundum, við í minsta lagi 14 daga millumbili.

Soleiðis góðkend á býráðsfundum 1. juli og 30. september 2013 og send landsstýrinum til kunningar.

Jóhan Christiansen ______________________________

Oluffa Joensen ______________________________

Hjalti Dalheim ______________________________

Brandur Jacobsen ______________________________

Hanna Jensen ______________________________

Ólavur Olsen ______________________________

Emma Rasumssen ______________________________

Hanus Jacobsen ______________________________

Árni Jacobsen ______________________________